# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Minningarorð um Hentzar Joensen, Vágur

**f. 17. juni 1913 - d. 26. desember 2005**



Annan jóladag fekk eg boðini um, at mín góði vinur Hentzar hevði sett segl til heimferð, sum vit plagdu at taka til fyrr í tíðini. Nú hann andaðist, var hann 92 ára gamal. Vit komu at kennast fyri 17 árum síðani. Tað kom soleiðis fyri, at eg fór suður til Vágs á samfelagsmøti á hvítusunnu í 1988. Eg hevði ikki vissað mær nakað innivist, áðrenn eg fór suður. Ikki tí, tað stúrdi eg ikki fyri at tað fór at vera nakar trupulleiki. Sum vant byrjaðu møtini við bønarmøti. Tá ið møti var liðugt, var boðað frá at um onkur ikki visti sær nakra staðni at búgva, at steðga á í gongini. Tá var tað onkur nevndi at Hentzar er her, hann er altíð klárur at taka ímóti einum gesti, soleiðis kom okkara vinarband í lag. Eg var hjartaliga vælkomin at búgva hjá honum. Hentzar var tá einsamallur í húsi, konan var stutt framman undan deyð, so tað var ein ógvuliga stórur saknur hjá honum, at hon so brádliga var tikin burtur. Annars áttu tey børn í Vági, sum hjálptu, tá ið á stóð, serliga dótturin Elitha, sum búði í Vági.

Hentzar og konan Edith vóru bæði ættað úr Sandvík, men vóru flutt til Vágs fyri mongum árum síðani. Hentzar var sjómaður og hevði eisini siglt sum skipari við »Albert Wictor« og »Johannu«. Hann hevði eisini siglt við »Norðfarinum«, tað var har umborð at spírin varð lagdur til sítt umvendilsi, fortaldi hann fyri mær. Hann skrivaði í bløðunum um sítt umvendilsi, og táið hann læt seg doypa, so hann setti ikki ljósið undir skeppumálið, men vildi vitna frítt um sín Harra og Frelsara fyri almenninginum. Seinast eg hevði samband við Hentzar var í juli mánað, tá ið eg var suðuri í Vági í gullbrúdleypi hjá okkara góðu vinum Ásu og Róald. Tá búði eg hjá Hentzar, men tá var hann viknaður og mest seingjarliggjandi, men var klárur at tosa við og glaður í Harranum. Seinastu tíðina hevur hann búð á Sambýlinum í Vági.

Til seinast vil eg takka tykkum børnunum hjá Hentzar og Edith, at eg kom at kenna tykkum eisini, og serliga Jeanetta og Elithu, sum eg kenni best, at Harrin má verða hjá tykkum. Saknurin verður, men vit eiga eina livandi vón (1. Tess. 4,13-15).

Eg heilsi tykkum við hesum sangi úr GFS. nr. 702.

*Skjótt skal ljóða sigursongur,*
*heima hjá tær, eingin skilnaður er longur*
*heima hjá tær, eingin sorg skal bvósti tvinga*
*eingin freisting hjarta stinga*
*prís Guds lambið*
*ævigt klinga, heima hjá tær.*

**R. J.**

## Andlát og jarðarferðir

**Óli Jóhan Samuelsen** í Vági andaðist á Suðuroyar sjúkrahúsi 2. januar, 79 ára gamal.
Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Hilmar Heinesen**, Tórshavn, andaðist leygardagin 31. desember, 61 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum hósdagin klokkan 13.

**Beinir Holm**, Tvøroyri, andaðist nýggjársaftan, 76 ára gamal.
Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi mikudagin klokkan 18.00.
Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju hósdagin klokkan 13.00.

Kistan við **Aslaj Nielsen** í Sandavági fer av ellisheiminum í Miðvági mánakvøldið klokkan 18 í Sandavágs kirkju.
Jarðarferðin verður úr Sandavágs kirkju týsdagin klokkan 13.
Tey, ið vilja minnast Aslaj, kunnu lata Ellisheiminum í Vágum eina gávu, konto í Føroya Sparikassa.

---

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Sofía Molaug**
fødd Wardum, ættað úr Tórshavn

andaðist á Vågedalen sykehjem, Hinna, Stavanger, 31. desember 2005, 93 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Stavanger krematorium fríggjadagin 6. januar 2006 kl. 12.30.

*Familjunnar vegna*
**Elin**

---

## Dagurin í morgin

**4. januar. Metusalem,** sonur Enoks. Hann gjørdist 969 ár (1. Mós., 5,25-27).




HJÁLP TIL AT FESTA HUGSAN Á BLAÐ
Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Ført tú ikki tikið teg saman?**
Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin
"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo



Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo


# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá ið okkara elskaða kona, mamma, vermamma og omma

**Elly Bláhamar**
Vestmanna

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til starvsfólki á B6 og G1, prestar, berarar, sangarar og tykkum, sum hjálptu til við ervinum og øll sum vóru og fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað á foldum.
Hjartaliga tøkk øll somul, við ynskjum um eitt av Harranum signað nýggjár.

**Anfinn, Fríðálvur og Anna Maria**